# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hans Clementsen,** vanliga nevndur Hans í Andarisa, ættaður av Sandi, búsitandi á Seyðisfirði, andaðist 13. juni, 85 ára gamal. Jarðarferðin verður úr kirkjuni á Seyðisfirði leygardagin 18. juni.

**Elias Joensen,** Tórshavn, ættaður úr Froðba, andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin, 74 ára gamal. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum heim í Ebenezer mikukvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 14.

Tey, ið vilja minnast Elias kunnu lata Epileptikarafelag Føroya eina peningagávu, konto í Føroya Sparikassa

**Esbern Michael Magnussen,** ættaður úr Froðba, búsitandi í Havn, andaðist á Landssjúkrahúsinum 14. juni, 92 ára gamal. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum hóskvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum fríggjadagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini.

*Kelda: Útvarp Føroya*

## Heðin Joensen 40 ár



Hósdagin 16. juni fyllir Heðin Joensen í Havn 40 ár. Heðin vaks upp Undir Heygnum í Vesturbýnum, og hann er elsti sonur Hergerð og Líggjas Joensen.

Nógv kenna Heðin best sum ítróttarmann. Hann er ein av bestu badmintonleikarum, ið Føroyar nakrantíð hava havt. Fýra ferðir hevur hann verið føroyameistari í einmansleiki og átta ferðir í tvímansleiki, og harumframt vann hann saman við Jákup Midjord bronsu í tvímansleiki, tá ið oyggjaleikir vóru í Føroyum í 1989.

Heðin var í fleiri ár eisini fastur fúsur í verjuni á besta liðnum hjá HB, sum hann gjørdist føroyameistari við í 1988.

Til dagligt er Heðin Joensen stjóri hjá flutningsfelagnum Smyril Blue Water. Hann er skrivstovulærdur á Fiskasøluni og hevur eisini starvast hjá Eimskip. Eitt skifti búði Heðin og familjan í Hirtshals í Danmark, tá ið Heðin arbeiddi í søludeildini hjá Føroya Fiskasølu í Danmark.

Heðin er giftur Bjørg, dóttir Elsu og Birgar Johannesen í Havn, og tey eiga børnini Rannvá, Líggjas og Elsu.

## Karl Gudmund Henriksen 60 ár

Í dag, hósdagin 16. juni, verður Karl Gudmund Henriksen í Klaksvík 60 ár. Karl Gudmund munnu flestu miðaldrandi og eldri enn tað komast við. Hann var ein av stinnu verjuspælarunum á tiltikna fótbóltsliðnum hjá klaksvíkingum, sum framvegis eigur metið við flest vunnum meistaraheitum á rað.

Karl Gudmund er innføddur klaksvíkingur og uppvaksin í Gerðum. Foreldrini hjá honum eru Jonhild og Sámal Henriksen. Jonhild er dóttur Karolinu og Karl, sum var bóndi í Norðurstovu í Gerðum, og Sámal, sum doyði fyri nú fleiri árum síðani, var sonur Fíu og Gudda á Dalinum.

Karl Gudmund er elstur av fýra systkjum. Hini eru Kristina, sum býr í Klaksvík, Oddfríð, sum býr á Argjum og Sólgerð, sum býr í Havnini.

Karl Gudmund lærdi til smið hjá Klaksvíkar Byggivirki, sum Mallu menninir áttu. Umframt í tí yrkinum hevur hann verið útróðrarmaður, og so hevur hann tykist við ymiskt handverk.

Seinastu tíggju árini hevur Karl Gudmund saman við Hákuni Dam røkt deknatænastuna í Christianskirkjuni.

60 ára føðingardagsbarnið fór at spæla á dreingjaliðnum hjá KÍ í 1962. Frá 1964 og fram til miðskeiðis í sjeyti árunum var hann fastur maður á meistaradeildarliðnum. Fyrstu árini var hann oftast høgri bakkur, og tey seinnu árini var hann í miðverjuni, har hann vísti stóra kropsstykri og skjótleika, og har hann var kringur í høvuðspælinum.

Karl Gudmund var við til at vinna meistaraskapin í fótbólti í 1966, 1967, 1968, 1969, 1970 og í 1972. Hann var við til at vinna Ísafjarðarsúluna í 1966 og í 1967.

Tríggjar ferðir var Karl Gudmund á landsliðnum. Fyrsti dysturin var móti Oyrknoyum í Kirkwall í 1970, og síðani spældi hann eina ferð afturat ímóti Orknoyum og eina ferð ímóti Hetlandi.

Í 1972 giftist Karl Gudmund við Elini Heinesen, sum var ættað av Viðareiði. Tey bygdu í nýggjari útstykking omanfyri gamla býlingin í Gerðum, og tey fingu tveir synir – Sámal og Heri. Teir búgva báðir í Klaksvík. Elin doyði av herviligari sjúku í 1999. Nú eru fleiri ár síðani, at Karl Gudmund, sum eigur ein abbason, fann saman við Randi Jacobsen, sum í mong ár arbeiddi á Sosialinum og nú er blaðkvinna á Dimmalætting.

Petur Hermansen, Tórshavn:

## 30 ára starvsdag hjá PM

15. juni 2005 hevði Petur Hermansen í Havn 30 ára starvsdag hjá P/F Poul Michelsen heilsølu.

Petur er 57 ára gamal, sonur Súsonnu, f. Danielsen, dóttir Sofus í Horni í Havn, og Hans Marius Hermansen av Tvøroyri. Familjan búði á Tvøroyri, til tey í 1954 fluttu til Havnar at búgva.

Eftir lokna skúlagongd lærdi Petur til timburmann hjá Peturi í Gong, byggimeistara. Síðan arbeiddi hann í trý ár á heilsøluni hjá Kartna Winther á Eystaru bryggju í Havn.

15. juni 1974 byrjaði Petur sum bilførari hjá P/F Poul Michelsen. Fyritøkan, ið var stovnað árið fyri, helt tá til í Gundadali. Í 1979 varð flutt í nýggjan virkisbygning við Hoyvíksvegin. Petur hevur arbeitt á goymsluni og sum telefonseljari á skrivstovuni. Seinastu mongu árini hevur hann arbeitt sum sølumaður.



Petur er eisini kendur fyri síni avgjørdu sjónarmið um píkadekk og dálking, og hevur hann verið nógv frammi í fjølmiðjunum hesum sambandi. Einaferð hótti bæði løgtingið og landsstýrið við at saksøkja Petur, tí hann hevði úttalað seg alment um at tingfólk ferðaðust við Strandferðsluni uttan at gjalda, meðan øll onnur skuldu gjalda. Sakarmálið bleiv tó av ongum.

Eisini er Petur kendur innan country- og gospeltónleikin í Føroyum, har hann so meistarliga spælir steelgittar. Eitt av hansara frítíðarítrivum er flúgving við modellflogførum, og er hann ein av virknu limunum í Tórshavnar R.C. Felag.

Petur er giftur Marjun, f. Mohr Joensen, úr Sørvági. Tey búgva Norðasta Horni og eiga tveir synir, Jan, sum er løgreglumaður í Havn, og Heina, sum lesur virkisbúðskap í Århus. Marjun og Petur eiga eisini ommu- og abbadóttrina Ronju.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum , sum vístu samkenslu og hjálpsemi, tá góði maður, papi, verfaðir og abbi okkara

**Harry Jacobsen**
Tórshavn
ættaður úr Sandavági

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri blómur og kransar og takk til øll tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað

*Fyri tey avvarðandi*
**Lussi,**
**Anders, Gunn og Osvald**
**svigarbørn og abbabørn**

i
Sosialurin

**Dagurin**

**16. juni. Tycho.** Í fjórðu ella fimtu øld var hann biskupur í Amatus á Kypros.